# Hefti til næmingin




Rithøvundur: Elin á Rógvi

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2023

Nám: Asta Wolles, Gunvá Magnussen, Lis G. í Jákupsstovu og Marjun Ziskason

# Heima er ... (síða 7 – 14)

## Gulir seðlar

- Hvat man vera hent hendan dagin?
- Hví er Mai í jakkanum hjá Jóannesi?
- Git, hvat fer at henda.

Skriva stutt á tveir gular seðlar.



# Heima er ... (síða 7 – 14)
# Tá (síða 15 – 21)
# Flýggja (síða 22 – 23)

## At flyta

Les spurningarnar niðanfyri og skriva eina søgu, har tú brúkar svarini hjá tær.
Um tú ongantíð hevur flutt bústað, kanst tú ímynda tær svarini og skriva eina søgu.

- Hevur tú nakrantíð flutt bústað?
- Hví fluttu tit?
- Hvussu var tað?
- Minnist tú, hvussu húsini ella íbúðin sóu út?
- Minnist tú, hvussu nógv rúm vóru?
- Minnist tú litirnar inni? Hvørjir vóru teir?
- Minnist tú húsluktin?

© Nám

# Nú (síða 24 – 27)

## Líkleikar og munir

- Finnið líkleikar og munir ímillum Mai og Emmu.

# Slangur (síða 28 – 35)

## Staðarnøvn

- Farið inn á sona.fo og finnið Staðið.
- Kannið á kortal.fo, hvar Válur er.
- Hvussu eita vegirnir, sum Mai súkklar eftir, tá ið hon fer heimanífrá av Válavegi til Staðið?

## Yrking

Arbeiðið við yrkingini á síðu 35.

- Tosið um innihaldið.
- Hvussu er huglagið? Finnið orð, sum lýsa tað.
- Heitið á partinum er Slangur. Beint áðrenn yrkingina stendur *... orðini eru slangur, sum elta hana, svørt , slíggjut og etsandi*. Hvat man tað merkja?

# Horvið (síða 36 – 44)

## Samleiki og saknur

Mai ger mun á, hvussu hon er ættleidd í mun til gentuna, sum hon møtir í høllini á Skála.

- Hvør er munurin á ættleiðingini hjá Mai og gentuni úr Korea?
- Hvat fær Mai at ivast í, at hon ikki er líka ynskt sum hin gentan?
- Hvat er tað at vera føroyingur?

Tosa við ein makkara um spurningarnar og skrivið tykkara hugsan í punktformi. Tosið í flokkinum um, hvat tit hvør í sínum lagi eru komin fram til.

## Persónslýsing

Gerið eina persónslýsing av Mai, har tit bæði lýsa útsjónd og verumáta. Hugsið eisini um tað, sum tit vita um hana frammanundan.

## Fitt og fólkalig

Í partinum hugsar Mai:
“Hon hevði hvørki verið fitt ella fólkalig. Tey bæði orðini, sum øll uttanfyri húsini á Válinum annars brúktu um Mai. Hon var blivin eitt sindur kløkk av sær sjálvari, hví hevði hon svarað so illa aftur?
Ella kanska var tað ikki at svara illa aftur, men hon var bara farin avstað! Hon hevði eisini spælt dystin illa aftaná, og tað var ordiliga keðiligt, tí tað var dysturin um at koma í finaluna!”

- Tosa við ein makkara um at vera fitt og fólkalig. Hvat er tað?
- Tosið síðan í flokkinum um, hvat tit hava tosa við makkaran um.
- Eru tit samd?
- Hava tit í flokkinum reglur fyri, hvussu tit skulu vera ímóti hvørjum øðrum?
- Um ja, er nakað um at vera fitt og fólkalig?
- Er munur á, hvussu fitt og fólkalig Mai er, tá ið hon er heima, og tá ið hon er úti?
- Hvussu við tykkum? Eru tit øðrvísi heima enn úti?

# Snapp (síða 45 – 52)

## Barnastuldur

Git hvat er hent við Olivuri.

Emma skundar sær at snappa til mammuna at spyrja, hvar Jana er, tá ið hon og Mai hoyra um horvna barnið.

- Hví ger hon tað?
- Gerið eina persónslýsing av Emmu, har tit lýsa bæði útsjónd og verumáta. Hugsið eisini um tað, sum tit vita um hana frammanundan.
- Brúkið persónslýsingina, sum tit gjørdu av Mai í 6. parti, og finnið líkleikar og munir ímillum Mai og Emmu.



## Tailendsk/føroysk, síða 51

"Uppfør teg sum eina góða tailendska gentu," teskar mamman. Orðini hjá mammuni svíða í høvdinum á Mai, sum var hon sligin."

- Hvat hugsar tú, tá ið tú hoyrir hetta?
- Er Mai góð?
- Er Mai tailendsk?
- Er Jón tailendskur?
- Er mamman ikki nøgd við Mai?
- Er munur á at vera tailendsk og føroysk?
- Um ja, hvør er munurin?

© Nám

# Trilla (síða 53 – 60)

## Tíðindi

Tit kunnu skriva ein tíðindastubba um hendingina við horvna barninum.

Ímyndið tykkum, at tit hava snakkað við:

- Foreldrini
- Løgregluna
- Konuna, sum fann klæðini
- Og onnur …

## Mai og mamman (s. 54 – 55)

- Lýs sambandið ímillum Mai og mammuna.
- Hví heldur tú, at Mai er í so ringum hýri?

## Persónslýsing

- Ger eina persónslýsing av Odu.

# Undir illgruna (síða 61 – 69)

## Horvin

- Git, hvat er hent við børnunum, sum eru horvin úr barnagarðinum Gjáarlon í Vestmanna.

# Pitsa (síða 70 – 77)

## Tilknýti

Gerið kanning í flokkinum, hvaðani tit, foreldur tykkara og ommur og abbar tykkara eru ættað og hava búð.

| | | |
|---|---|---|
| Eg eri født/ur | Eg búgvi | Eg havi búð |
| Mamma er født | Mamma býr | Mamma hevur búð |
| Pápi er føddur | Pápi býr | Pápi hevur búð |
| Omma er født | Omma býr | Omma hevur búð |
| Abbi er føddur | Abbi býr | Abbi hevur búð |
| Omma er født | Omma býr | Omma hevur búð |
| Abbi er føddur | Abbi býr | Abbi hevur búð |

- Hvørjar bygdir og hvørji lond hava tú og tín nærmasta familja tilknýti til?
- Hvørjar bygdir og hvørji lond hevur flokkurin tilknýti til?
- Tit kunnu gera eitt kort, sum vísir tilknýtið til bygdir og lond hjá flokkinum.



# Lurta (síða 78 – 85)

## Persónslýsing

Tit kunnu arbeiða við persónslýsingum av Mai og Emmu.
Tá ið Mai og Emma eru og eta pitsa og avlurta politistarnar, er ógvuliga ymiskt, hvussu tað ávirkar tær.

- Les brotið á síðu 78 – 82 og finn dømi úr tekstinum, sum lýsa Mai og Emmu.
- Tak Venn-myndina, sum tú hevur gjørt, fram aftur og legg afturat líkleikum og munum á Mai og Emmu.
- Tak persónslýsingina av Mai úr 6. parti fram aftur og legg afturat.

## Pápi Mai

Í hesum partinum hugsar Mai nokk so nógv um pápa sín.

- Hvat fáa vit at vita um pápa Mai?



© Nám

# Innrás (síða 86 – 94)

## Huglag

Tit kunnu arbeiða við huglagi.

Vís á dømi um huglagið.

- Er Mai í góðum ella ringum lag?
- Hvat ávirkar lagið á Mai?
- Er lagið tað sama ígjøgnum allan partin?
- Hvat heldur Mai um, at tailendsku vinkonurnar hjá mammuni koma á vitjan?
- Hvussu ávirkar tað Mai at hoyra um, hvussu mamman og Jóannes hittust?
- Hví man tað hava so nógv at týða fyri Mai at vita, hvussu tey hittust?
- Man Mai dáma, at mamman sigur, at hon er ein prinsessa?

## Persónslýsing

Hetta brotið stendur á síðu 52.
" Hendan dagførda útgávan av mammuni samsvarar so illa við myndina av mammuni, sum Mai hevði roynt at hildið fastari, tá henni longdist eftir henni í Tailandi. Tann mamman, sum Mai hevði longst eftir, var mild og blíð. Mamman smílist ikki longur, sum hon gjørdi í Tailandi. Mai minnist, hvussu øll hugdu at henni og vildu práta við hana. Nú er hon so køld … Tað er sjáldan, at hon smílist til Mai í hvussu er, hon angrar helst, at hon tók hana til Føroya. Men hon strálar heldur ikki, tá ið hon gongur úti, sum hon gjørdi í Tailandi. Hon er næstan ósjónlig…"

Hetta brotið stendur á síðu 88.
"Mai dámar væl, tá ið tað er innrás … henni dámar mammuna, sum flennir og prátar, og vinkonurnar eru stuttligar, og so er tað allur maturin … Viðhvørt hava tær ymiskt við, og viðhvørt gera tær okkurt saman … Tað er næstan sum at vera heima aftur … heima hjá ommu og abba."

Ger eina persónslýsing av mammuni út frá báðum brotunum.

- Hví man mamman vera so ymisk í Tailandi og í Føroyum?
- Hví man mamman vera sum hon var í Tailandi, tá ið hon er saman við sínum tailendsku vinkonum í Føroyum?

# Misnøgd (síða 95 – 101)

## Søga

- Man Miriam vera Olivur?
- Hvat heldur tú, at Mai fer at gera nú?
- Skriva eina søgu, har tú svarar spurningunum omanfyri og fortelur søguna, sum um tú vart Mai. Tað vil siga, at tú skalt skriva í 1. persóni. Minst til at brúka allar sansirnar og at fáa søguna spennandi.
- Lesið søgurnar upp fyri hvørjum øðrum.

# Jollan (síða 102 – 106)
# Heyganes, (síða 107 – 112)
# Neyðarkall, (síða 113 – 119)
# Saman við tær (120 – 128)

## Yrking

Yrkingin *Til Jane* fremst í bókini hevur eitt ávíst skap.

- Hví man hon tað?
- Kennir tú orðini í yrkingini aftur?

Bókin endar við einari yrking, lesið hana og arbeiðið við henni.

- Hvussu byrjar hvørt ørindi?
- Hvørji orð verða brúkt um heimið?
- Kenna tit tykkum aftur í yrkingini?

## Endursøgn ella teknirøð

- Skriva endursøgn ella ger teknirøð um søgugongdina.
- Leggið fram fyri flokkinum.

## Tema

Tema er tað, sum teksturin er um. Tað stendur ikki beinleiðis í tekstinum, hvat temað í tekstinum er. Vit kunnu lesa tað ímillum reglurnar, hugsa um tað og práta okkum fram til tað.

- Hvat er temað í *Flytifuglar*?
- Eru fleiri temu?
- Tosa við ein makkara um eitt ella fleiri temu í *Flytifuglar*.
- Tosið saman í flokkinum um eitt ella fleiri temu í *Flytifuglar*.

## Spenningssøga

Søgan í *Flytifuglar* er ein spenningssøga.

- Hvat eyðkennir eina spenningssøgu?
- Hvør hending ger, at hetta verður til eina spenningssøgu? Hetta er kveikjarin.
- Frásøgufrymilin arbeiðir við kveikjara, 1. og 2. skifti. Vísið á 1. og 2. skifti í *Flytifuglar*.



Tit kunnu arbeiða saman við einum makkara og síðan tosa saman í flokkinum, hvørja niðurstøðu, tit eru komin til.




© Nám

## Samtíðarsøga

Flytifuglar er ein samtíðarsøga.

- Hvat er ein samtíðarsøga?
- Hvørji tekin eru um, at hetta er ein samtíðarsøga?
- Skrivið 3 dømi hvør.
- Samanberið tykkara dømi í flokkinum.

Tíð

- Hvussu long er søgutíðin?

## Flytifuglar

- Bókin eitur *Flytifuglar*.
- Hví man hon eita so?
- Kunnu flytifuglar vera annað enn fuglar? Hvat?
- Kunnu tit nevna nakran "flytifugl" í bókini?

## Byrjan og endi

- Hví man Mai vera vónbrotin, tá ið mamman ikki kemur á politistøðina eftir henni?
- "Okkurt brotnar innan í Mai" - hví man Mai kenna tað soleiðis?
- Hvussu hevur Mai tað, tá ið Jóannes sigur "dóttir mín"?
- Bókin byrjar og endar næstan líka. Tað er tó ein munur – ein stórur munur. Hvør er munurin?

## Hugleiðið víðari

- Hvat hendir, tá ið Mai kemur heim til mammuna?
- Hvussu verður hjá Mai at fara aftur í skúla?
- Hvussu man sambandið fara at vera ímillum Mai og Jákup?